## Steintór Larsen, bygdaráðsformaður í Fuglafirði skrivar:

# Setið smærri elverk út í størru áirnar



Steintór Larsen, bygdaráðsformaður í Fuglafirði: — Vit kunnu útnytta vatnið í ánni uttan at gera stóra kostnaðarmikla vatnbyrging

### — soleiðis at tey, sum fráleið, stóran part av árinum kundu nøkta størri og størri part av samlaða orkutørvinum

*Fuglafjarðar kommuna arbeiðir í løtuni við eini ætlan at seta upp turbinur í eini á. Íløgan er ikki størri enn so, at hetta í longdini kann løna seg. Orkan skal m.a. brúkast til at hita upp teir almennu bygningarnar so sum skúlar, ítróttarhallir og svimjihyllar.*
*Sosialurin hevur heitt á bygdaráðsformannin í Fuglafirði, Steintór Larsen, og biðið hann greiða okkum frá hesum ætlanum. Hann skrivar:*

Í eitt mannaminni hevur nógv verið tosað um, hví ikki vatnið úr teimum stóru áunum runt um í landinum, verð útnyttað til elframleiðslu.

Ikki er tó at ivast í, at vanliga metanin av vatnnøgdunum hevur verið nógv yvirdrivin. Hetta serliga av tí, at táið nógv avfall er, gerast árnar skjótt ógvuliga stórar, og siggja uppaftur størri út av tí nógva skúminum. Tíverri fjarða tær líka skjótt aftur, tá slitið er í.

Í Fuglafirði eru 2 stórar áir — Skarðsá og Gjógvará. Tosað hevur verið um, at tær saktans kundu givið nógva elorku, um turbinur vórðu settar í tær. Higartil er tó einki gjørt hesum viðvíkjandi.

### Útreiðslur til upphiting av almennu bygningunum

Sum oljan er dýrkað hesi seinastu árini, hevur tosið um alternativar orkukeldur verið ógvuliga nógv frammi bæði millum lands- og kommunalpolitikkarar og manna millum annars. Ikki er hetta løgið, tá ið ein hugsar um, hvussu oljuútreiðslurnar eru vorðnar størri og størri partur av rakstrarútreiðslunum, ikki bert hjá sjóvinnuni, men eisini á landi, bæði innan iðna og tænastuvirksemi — heruppií eisini kommunalu útreiðslurnar til upphiting av almennum bygningum. Serliga skúlar, svimjihylar og itróttarhallir, sum ikki bert skulu upphitast, men eisini krevja nógva orku til tað heita vatnið, sum fólk nýta, tá ið tey fara undir brúsurnar, áðrenn og aftaná, tey hava verið úti í tí kloreraða vatninum.

Hvussu stórar útreiðslurnar eru til el og hita í einum skúla sæst av niðanfyri standandi talvu:

**Oljunýtsla + el hjá Fuglafjarðar skúla við svimjihøll í kr. fyri niðan fyri nevndu figgjarár:**

**1974/75 ..... kr. 135.089,—**
**1975/76 ..... kr. 137.096,—**
**1976/77 ..... kr. 147.019,—**
**1977/78 ..... 179.753,—**
**1978/79 ..... kr. 181.899,—**
**1979/80 ..... kr. 217.677,—**
**1980/81 ..... kr. 316.851,—**

**Fyri 1980/81 var oljan 104.030 litrar fyri kr. 210.008,—, meðan streymnýtslan var 187.135 kwh. fyri kr. 102.324,80 og tað fasta gjaldið var kr. 4.517,20.**

**Tá ein sær tann stóra vøksturin hesi seinastu árini, tekur spurningurin seg sjálvandi upp, um ikki vit við onkrum tiltaki kunnu halda tørn ella heldur minka um hetta talið uttan í størri mun at noydast at skerja aktivtetirnar í skúlanum og svimjihylinum?**

### Útnytta vatnið uttan stóra vatnbyrging

Fyrr nevnda á — Skarðsá — rennur dygst eystan fyri skúlan, og fór undirritaði undir at kanna møguleikar at útnytta vatnið í ánni uttan at gera eina kostnaðarmikla stóra vatnbyrging. Tá kommunan somuleiðis var áhugað at gera eina lítla byrging í 100 metrar hædd til eyka vatngoymslu, varð nærliggjandi at greipa hesi bæði málini. Tá ymiskt var kannað, varð prinsipskitsa gjørd.

Tað stóra frávikið frá vanligum vatnorkuverkum er, at innskotni elektroniski automatikkurin millum generator og forbrúkaran (svimjihylur/skúlin) bert letur verkið geva streym í tann mun, áin hevur vatn til tess. Ella sagt við øðrum orðum

1.
Verkinum nýtist ikki stóra vatngoymslu.

2.
Ikki er neyðugt at taka alt vatnið úr ánni. (náttúruskynsamt).

3.
Frekvensurin og spenningurin eru tey somu antin nógv ella lítið vatn er í ánni.

4.
Streymurin kann nýtast til upphiting og gløðilampur v.m.

Elektronikkurin er útviklaður á Polyteknisk læreanstalt í Lundtofte í samband við vindmylluroyndir gjørdar av professaranum Ulrik Grubbe og er almannakunngjørdur í Elektroteknikkeren nr. 10 frá 22. mars 1980.

Kortið yvir ætlaða økið, sum liggur oman fyri 100 metrar, gevur umleið 1 km² avfallsøki, sum kann økjast. Samanborið við avfallstølini fyri 25 tey seinastu árini frá Veðurstøðini, kom ein fram til, at ein 56 kw. generator lágt sett kundi væntast at geva eina árisframleiðslu upp á 300.000 kwh. ella fyri umleið 250.000,— kr. í streymi við dagsprísi kr. 0,83 (fyri yvir 10.000 kwh.).

### Tilboð

Hesir 300.000 kwh. sendir inn í ketilin vildu spart okkum um 35.000 litrar av olju ella við dagsprísi kr. 81.500,—. Nú er so spurningurin: Hvat kostar so eitt tílíkt vatnkraftverk? Og kann tað loysa seg at keypa hetta?

Eitt fyriliggjandi tilboð sær soleiðis út:

1 stk. vatnturbin 56 kw./netto 95 m og 75 m. pr. sek.

1 stk. synkrongenerator 380 volt/50 hz/virkningsgrad 89%.

Botnrammi til turbinu og generator.

1 skt. apparatanlegg (talva).

1 stk. elektroketil — 50 kw. við 400 volt.

Alt hetta tilsamans fyri n.kr. 526.000,—, um kr. 663.000,— í okkara peningi.

Haraftrat kemur 300 metrar av PVC-rørum — diametur 250 mm innan NT6 og 300 metrar av PVC-rørum — diametur 250 mm innan NT 10 kr. n. kr. 80,000,— í okkara peningi kr. 100.000,—.

1 stk. automatiskur yvirflotsregulator n. kr. 23.500,— í okkara kr. 29.600,—.

Tilboðið upp á n. kr. 526.000,— er við frakt og uppskiping í Fuglafirði, meðan rørini eru Fob. norska havn.

Haraftrat kemur frakt fyri rørini og tollur av øllum umleið kr. 180.000,—.

Umframt hetta mugu vit rokna við kr. 200.000,— fyri byrging, niðurgraving av rørum og stoyping av húsi ella tilsamans tá ið verkið er klárt at taka í nýtslu **før. kr. 1.143.000,—**.

Í norska tilboðnum er eisini við í prísinum montering og innkoyring.

Hetta sær í fyrstu syftu ikki serliga lovandi út, men tá ein hugsar framyvir, fer hetta at verða ein góð investering. Um verkið verður figgjað við vanligari lántøku yvir 10 ár, skal kommunan rinda lánið aftur við umleið kr. 200.000,— um árið. Samtíðis sum kommunan sparir góðar 80.000,— kr. um árið í olju t.v.s., tá ið lánið er afturgoldið gevur verkið yvirskot.

Verður hitapumpan sett í samband við verkið beinanvegin, sigur teoriin, at sparda oljunøgdin verður 3—4 ferðir størri ella umleið tað sama, sum skúlin nýtir í løtuni.

### Samandráttur

Eitt minikraftverk kostar, tá ið tað er klárt at seta í gongd, umleið kr. 1.100.000,—. Metta ársframleiðsla 300.000 kwh., sum svarar til kr. 250.000,— við núverandi elprísum. Verður partur av framleiðsluni nýttur til at reka eina hitapumpu, sum tekur hitan úr vatninum frá turbinuni, meðan hin parturin fer inn á SEV-netið við skúlan, er projektið sera rentabult, og íløgan trygg beinanvegin.


### Orkuráðið hugt at

Lagt skal verða aftrat, at Orkuráðið hevur hugt at projektinum. Teir hava eisini verið á staðnum fyri at kanna viðurskiftini. Semja varð um at fáa til vega tøl fyri, hvussu vatnnøgdin broytist frá tíma til tíma yvir 1 ár.

Avgjørt varð tí, at Orkuráðið letur kommununi til láns tól, sum beinleiðis avlesir vatnnøgdina pr. sekund, soleiðis at vit til ta tíð kunnu dimensjonerá anleggið rætt.

Til seinasta skal verða lagt aftrat, at ikki er ætlanin at Skarðsá skal liggja turr hereftir. Nei, vit ynskja framvegis, at kunna siggja og hoyra ánna. Hon er og skal framvegis verða ein partur av okkara umhvørvi, soleiðis at vit skulu kunna kenna hana sterkari, tá hon í regnveðri fossandi omaneftir, letur part av sínari megi, til at lætta okkum um; meðan vit afturfyri, tá ið turkur er, lata hana renna ótálmaða.

Soleiðis kundi verið gjørt og verður helst gjørt




Strikumynd, sum visir tonkta mátan at gera anleggið uppá, um elektroniska stýringin verður nýtt